## Eg geri hetta fyri meg sjálva

Connie Brockie verður við í sendirøðini Paradise Hotel í ár, og hon angrar ikki, at hon fór við í sendingina. - Tey nærmastu kenna meg, sum eg eri, og um onkur fær ilt av hasum, so mugu tey um tað. Eg geri hetta fyri meg sjálva og ikki fyri nakran annan, sigur Connie Brockie. - Tað, sum fólk hava sagt við meg, síðani hetta kom fram, hevur bara verið positivt. Men tað munnu helst vera onnur, sum halda nakað annað, sigur hon.



## Øll spyrja nær

Tvær vikur eru farnar av Paradise Hotel sendirøðini, sum TV3 sendir, og samanlagt er talan um 16 vikur. Stóri spurningurin er nú, nær Connie Brockie kemur við í sendirøðina. - Tað er tað, sum øll spyrja meg um nú. Eg kann ikki siga, nær eg komi við. Fólk mugu bara fylgja við sendingini og vita, hvat hendir, sigur Connie Brockie. Seinastu hyggjaratølini í Danmark vísa, at Paradise Hotel er so væl umtókt sum ongantíð áður, so tað verða nógvir hyggjarar, sum fara at fylgja Connie í røðini.



*Óli Breckmann og Annika Steintórsdóttir Biskopstø hittust 21 ár eftir, at Óli skrivaði um serligan barnadóp í Kvívíkar kirkju*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Annika hitti Óla

**Fyri 21 árum síðani var stórt uppstandilsi í Dagblaðnum, tí Hundurin Brúni var sungin til barnadóp í Kvívíkar kirkju. Leygarkvøldið hitti Óli Breckmann nú 21 ára gomlu kvinnuna, sum fór til dópin tann nógv umrødda dagin**

Hundurin Brúni í Kvívíkar kirkju.

Dagblaðið ruddaði forsíðuna fyri 21 árum síðani, tá ið kendi Frændasangurin var sungin í kirkjuni í Kvívík. Høvið var barnadópur, og so hildu Steintór Rasmussen og onnur, at tey kundu syngja onkran sang, sum stolti pápin sjálvur hevði gjørt.

Men tað vóru ikki øll, sum tók so væl ímóti tí, og Dagblaðið legði við í eldin til kjakið. Tónin var ikki sørt harður og argandi, og tað vóru tey, sum ikki hildu tað hóska seg, at ein slíkur poppsangur var sungin í kirkjuni.

Síðani er nógv vatni runnið í ánni, og leygarkvøldið hitti Óli Breckmann, sum tá var blaðstjóri á Dagblaðnum, kvinnuna, sum fyri 21 árum síðani fór til dópin í Kvívík.

Hon eitur Annika Steintórsdóttir Biskopstø og er dóttir Jóngerð Biskopstø og Steintór Rasmusen, sum skrivaði sangin um Hundin Brúna.

# Frændur skaptu

**Óli Breckmann heldur, at Frændur við sínum politisku sangum skapti ein nýggjan front í Føroyum í 80'unum, men Rani Nolsøe heldur, at Óli Breckmann framprovokeraði eitt stríð millum vinstra og høgra. Leygarkvøldið hittust stavnamaðurin á Dagblaðnum og protestsangararnir í Frændum til lívligt kjak á Rás2**



HVONN LIVE
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Friðargongur úr Mjørkadal. Kravgonga ímóti amerikanskum herskipi á Havnini. Politiskir protestsangir og hvassar atfinningar í Dagblaðnum.

Tað var bagrundini fyri lívliga kjakinum millum Frændur og Óla Breckmann í sendingini Hvonn Live leygarkvøldið.

Partarnir stóðu á hvør sínum veingi í politiska stríðnum í Føroyum í 80'unum, og tá ið teir nú hittust aftur til eitt kjak um gamlar dagar, vóru meiningarnar framvegis eldhugaðar, men viljin var eisini at hugleiða og taka saman um gomlu tíðina, sum í løtum líktist einum vápnaleysum kríggi her í Føroyum.

- Tá ið Frændur komu brestandi inn á vøllin í 80' unum, fingu vit líkasum ein nýggjan front í føroyskum politikki. Tit royndu at syngja sosialismuna inn í hjørtuni á føroyingum, og tað eydnaðist eisini serliga væl, hóast tit ongantíð megnaðu at vinna fjøldina. Vit høvdu altíð munin í løgtinginum, segði Óli Breckmann.

Hann helt, at tað var neyðugt at geva teimum vinstravendu mótspæl.

- Tað var jú eitt stríð millum tær ytru politisku sannføringarnar – millum høgra og vinstra, millum demokrati og diktatur.

### Fór og langt

Rani Nolsøe helt, at Óli Breckmann gjørdi ov nógv av í sínari skriving í Dagblaðnum fyri 20 árum síðani.

- Óli fór for langt í 80'unum. Serliga tann óneyðuga framprovokeringin av høgra-vinstra stríðnum var óneyðug fyri eitt so lítið samfelag sum tað føroyska. Eg haldi eisini, at vit av tí sama vóru illa fyri politiskt at taka ímóti kreppuni í 90'unum, tí vit høvdu ligið í einum politiskum eljustríði í Føroyum við Óla Breckmann á odda, segði Rani Nolsøe.

Hesum tók fyrrverandi stavnamaðurin á Dagblaðnum ikki undir við.

- Eg haldi ikki, at tað var neyðugt at framprovokera nakra mynd, tá man sá kravgonguna ímóti USS McCloy og friðargongurnar úr Mjørkadali. Og hetta var eitt úrslit av stríðnum millum eystur og vestur.

- Tíðin hevur eisini víst, at tann stóri spenningurin hvarv, tá ið sovjetsosialisman fall í 1990. So tað vóru ikki USA og vit, sum vóru orsøkin til stríðið, men heldur hin síðan. Og tað var tykkara lið, sum rýmdi av vøllinum, og síðani var bara eitt superligalið eftir. Nú hevur verið friður á okkara leiðum í nógv ár, men nú er tað við at henda, at islamfasisman er við at reisa høvdið og er blivin ein vandi fyri okkum. Eg vóni, at tit velja røttu síðuna hesaferð, segði Óli Breckmann argandi.

### Kendu seg hongdar út

Eyðun Nolsøe var við at